# Tjaldrið fer ongan veg

**Tjaldrið liggur framvegis við bryggju á Skála og óvist er, um Tjaldrið yvirhøvur fer at loysa á hesum sinni. Skipið skal á beding fríggjadagin, og hetta arbeiðið fer væntandi at taka ein mánað**

VAKTARSKIP
*Stefan í Skorini*

Hetta er tólvti dagurin, at vaktarskipini bæði, Brimil og Tjaldrið, liggja fyri teym. Tey hava ligið svínabundin á Skála síðan 1. juni. Tað er tí okkurt, sum bendir á, at Fiskiveiðieftirlitið hevur trupulleikar at fáa maskinmeistarar til skipini bæði.



*Tjaldrið fór ikki avstað sum ætlað týsmorgunin, hóast Fiskiveiðieftirlitið hevði givið boð um tað. Óvist er um skipið yvirhøvur fer at loysa, áðrenn tað skal á beding fríggjadagin*
*Savnsmynd*

Útvarp Føroya visti í týsdagin at siga, at Tjaldrið eftir ætlan skuldi loysa frá bryggju týskvøldið. Hetta var tó av ongum, tí mikumorgunin lá tað framvegis á Skála.

– Vit liggja framvegis við bryggju, og vit, sum eru umborð, vita ikki, nær ella um vit fara at loysa, sigur Absalon Eliasen, yvirstýrimaður á Tjaldrinum.

Hann sigur, at manningin fekk boð frá Fiskiveiðieftirlitinum um at fara út týskvøldið, men av eini ella aðrari orsøk var hetta av ongum. Hann er tó ikki heilt greiður yvir, hví henda ætlanin varð slept.

Elmar Højgaard, stjóri á Fiskiveiðieftirlitinum, sigur, at tað var ein avgerð hjá leiðsluni ikki at lata skipið fara, men hann vil ikki koma nærri inn á, hví Tjaldrið ikki legði frá bryggju.

Hann avsannar, at Fiskiveiðieftirlitið hevur trupulleikar at fáa maskinmeistarar til arbeiðis umborð á Tjaldrinum, og at hetta skal vera orsøkin til, at Tjaldrið framvegis liggur fyri teym. Óvist er um Tjaldrið loysir, áðrenn tað skal á beding fríggjadagin 13. juni.

### Bara ein til arbeiðis

Sum støðan er í løtuni, er bara ein maskinmeistari til arbeiðis hjá Fiskiveiðieftirlitinum. Meðan ellivu maskinmeistarar søgdu seg úr starvi, valdi hesin eini at vera verandi umborð.

Síðani hevur Fiskiveiðieftirlitið lýst størvini leys, og tríggir nýggir maskinmeistarar vórðu settir í starv. Hesir eru av ókendum orsøkum ikki komnir til arbeiðis enn.

Fyri at Tjaldrið skal fara út er neyðugt við trimum maskinmeistarum – einum maskinstjóra, einum 1. meistara og einum 2. meistara.

Maskinmeistarafelagið noktar framvegis limum sínum at søkja størvini, sum Fiskiveiðieftirlitið lýsir leys og krevur, at teir ellivu fáa størvini aftur.

### Tjaldrið í dokk

Fríggjadagin 13. juni skal Tjaldrið á beding. Skipið skal hava ein nýggjan david til eitt nýtt slag av boarding bátum, sum eru komnir umborð. Harumframt skal maskinan eftirhyggjast, og aðrar smávegis umvælingar skulu gerast.

Absalon Eliasen, yvirstýrimaður, væntar, at hetta arbeiðið fer at taka umleið ein mánað, og tí verður Tjaldrið neyvan at síggja í føroyskum sjógvi fyrr enn um miðjan juli.

Hóast bert ein maskinmeistari er til arbeiðis, er Tjaldrið altíð tilreiðar at koma til hjálpar í eini neyðstøðu.

Fríggjadagin er tað sostatt bara Brimil, sum skal røkja vaktar- og bjargingartænastuna undir Føroyum. Tað er tó eingin ivi um, at í eini neyðstøðu er skipið klárt at fara til hjálpar.

Maskinmeistarar hjá SEV:

## Nú skal okkurt henda

SEV
*Stefan í Skorini*

Maskinmeistararnir hjá SEV eru av álvara farnir at ótolnast inn á SEV og Fíggjarmálaráðið. Nú skal okkurt henda við teirra sáttmálaviðurskiftum, men teir halda framvegis fast við tann tvey ára sáttmálan, sum Karsten Hansen vrakaði.

Týsdagin vóru maskinmeistararnir hjá SEV á fundi við nevndina fyri at tosa um, hvat gerast skal við støðuna.

Zacharias Zachariassen, næstformaður í Maskinmeistarafelagnum, sigur, at limirnir umrøddu, hvørjar møguleikar felagið hevur at ávirka støðuna, og hvussu farast skal fram, men enn er ikki gjørt av, hvørji tiltøk verða sett í verk.

– Nú má okkurt henda. Vit kunnu ikki liva við hesi støðuni, sigur Zacharias Zachariassen.

Hann sigur, at limirnir umrøddu at leingja tann tvey ára sáttmálan, sum Karsten Hansen hevur vrakað, við einum ári. Lønarhækkingin tað síðsta árið skal tó ikki vera á eins høgum støði sum hini bæði árini.

# Mentanarpolitikkur á breddan

**Tann 14. og 15. juni, sum er leygardagin og sunnudagin, verður stór ráðstevna í Norðurlandahúsinum í Havn, sum fer at snúgva seg um mentanarpolitikk í Norðurlondum. Fleiri áhugaverdir útlendskir gestir vera við**

RÁÐSTEVNA
*Stefan í Skorini*



*Norðurlandahúsið verður komandi vikuskiftið karmur um eina stóra altjóða ráðstevnu um mentanarpolitikk. Fleiri áhugaverdir útlendskir gestir vera við*

Leygarmorgunin verður lagt fyri við fyrilestrum hjá Peter Duelund og Eyðun Andreasen. Eftir middag fara Susanne Klausen, rithøvundur, at røða um smátjóðir og mentanarpolitikk. Micheal Russel, fyrrverandi andstøðuráðharri í Skotlandi, fer at røða um list og ferðavinnu. Arthur Watt frá listagrunninum í Hetlandi fer eisini at hava ein fyrilestur.

Patrick J. Murphy úr Írlandi fer at siga sína hugsan um sambandið millum list og ídnað. Hann hevur verið formaður í írska listaráðnum í trý ár, og hann var eisini nevndarlimur í fleiri ár.

Seinni fer Finn Therman Fredriksen at siga sína hugsan um myndlistina hjá Ingálvi av Reyni og Tróndi Patursson, og Kinna Poulsen fer at kommentera. Síðani fer Hannes Sigurðsson, stjóri í listasavninum á Akureyri, at tosa um, hvussu mentanarlig sambond kunnu knýtast í einum globaliseraðum heimi.

Leygarkvøldið verður so konsert í Listaskálanum, har Petra Iversen fer at syngja Kingosálmar í sambandi við 300 ára hátíðarhaldið hjá danska sálmaskaldinum.

Sunnudagin verður pallborðsfundur fyri og eftir middag við luttøku av bæði føroyingum og útlendingum.

Ráðstevnan, sum telur fleiri altjóða luttakarar, fer at viðgera myndlistina sum part av ferðavinnu og um hesir báðir tættir - myndlistin og ferðavinnan - kunnu samstarva og kanska leggja higartil ókendar lunnar undir staðbundnu listina, serliga í smáum samfeløgum.

Lise Lyck, lektari á danska Handilsháskúlanum, hevur givið tvær bøkur út um hetta evni, og fer eisini at gera sínar metingar á hesum økinum.

Á ráðstevnuni verður tosað á norðurlendskum og enskum, og tað kostar 500 krónur fyri hvønn luttakara.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Hans Arne Nielsen el-innleggjari í 50 ár

6. juni 2003 hevði Hans Arne Nielsen í Sandavági arbeitt sum el-innleggjari í 50 ár. Hans Arne er føddur og uppvaksin í Sandavági, sonur Jóhannu, f. Simonsen, og Thor Nielsen, skipara, bæði úr Sandavági. Sum 15 ára gamal fór hann í læru sum elektrikari hjá Sigird av Reyni í Havn. Eftir at hava lært í hálvtannað ár hjá Sigird, lærdi hann seg lidnan hjá systkinabarninum, Christian Nilsen, maskinmeistara, í Sandavági. Í september 1952 fór Hans Arne, saman við trimum øðrum Føroyingum, til Danmarkar, teir vóru: Frants Petersen av Selatrað, Axel Jacobsen úr Fuglafirði og Jógvan Petersen úr Fuglafirði (Jógvan á SEV). Allir høvdu teir lært til elektrikara í Føroyum. Í Danmark gingu teir á el-innleggjaraskúla og tóku sveinaroyndina, sum teir ikki kundu taka í Føroyum tá. Allir fýra tóku prógv sum el-innleggjarar 6. juni 1953.



Eftir tað kom Hans Arne heim aftur til Føroyar og fór at arbeiða hjá Christian Nielsen í Sandavági sum el-innleggjari. Har arbeiddi hann til 1956, tá hann yvirtók virkið hjá Christiani Nielsen, sum tá flutti til Skopunar at búgva. Christian setti el-motorin hjá Sandavágs kommunu, frá 1949, upp í Skopun. Síðan 1956 hevur Hans Arni arbeitt sum sjálvstøðugur vinnurekandi. Hann hevur havt fólk í arbeiði, og 12 mans hava lært til elektrikara hjá honum.

Í 1961 giftist Hans Arne við Sunrid, f. Jacobsen, dóttir Solveig og Alfred Jacobsen, úr Sandavági. Bæði Sunrid og Hans Arne hava verið ítróttarfólk, tey hava t.d spælt hondbólt og róð kapp við Sandavágsbátinum. Tey eiga fimm børn, tey eru: Sonni, Torkil, Allan, Solveig og Jóhan. Øll børnini búgva í Sandavági uttan dóttirin, Solveig, sum býr í Sørvági. Næsti sonurin, Torkil, tað var hann sum setti Føroyar á heimskortið, tá hann í 1990 spældi á føroyska fótbóltslandsliðinum og setti bóltin í eysturríkska málið.

## Reingering í 20 ár



*Jóannes og Mary Slættanes*

6. juni varð fyritøkan Fa. Reingering í Havn 20 ár. Tað var 6. juni 1983, at Mary Slættanes í Havn stovnaði vaskifyritøkuna Fa. Reingering. Mary er ættað frá Gjógv, dóttir Hansinu og Oliver Debes. Familjan flutti til Havnar í 1956.

Hugskotið fekk Mary, tá systir hennara spurdi hana, hví hon ikki bara fór at vaska, tá henni dámdi so væl at vaska. Hon byrjaði í smáum. Á veg út til fyrsta kundan fór hon inn í ein handil í Havn og keypti síni fyrstu vaskiamboð. Hetta var 6. juni 1983, og hon goymir enn kekkin, sum hon fekk fyri tað arbeiði. Fyritøkan vaks skjótt, seinni í 80-unum hevði hon umleið 30 fólk í starvi. Hon keypti sær eini hús í Dalatúni í 1989 og eitt vaskarí í Mykinesgøtu í 1991. Men so kom kreppan, og tað sum skjótast bleiv spart burtur varð reingerðingin. Í kreppuárunum vóru tey einans 9 starvsfólk. Í 1995 bleiv vaskaríið í Mykinesgøtu selt. Síðan tá hevur alt virksemi verið í Dalatúni, og fyritøkan skifti navn til Vaskarí & Reingering. Í 1998 yvirtók sonurin, Jóannes Slættanes, fyritøkuna. Í dag arbeiða 15 fólk í fyritøkuni.

## Tøkk

Hjartans takk fyri tað stóru samkenslu og hjálpsemi,
sum víst varð okkum, tá okkara kæra og elskaða kona,
mamma, systir, vermóðir og omma

**Maria Nystrøm Egholm**
Tórshavn

lá sjúk, doyði og varð jarðað.

Tøkk til tykkum øll, sum á ymiskan hátt
hjálptu til við jarðarferðina.
Ein serlig tøkk til Føroya Sparikassa
og Skipafelag Føroya.

Tøkk fyri kransar og blómur og til tykkum mongu,
sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað
her á fold.

Hjartans tøkk øll somul.

*Familjunnar vegna*
**Hákun Egholm**

## Axel Krogh deyður



Fríggjadagin 6. juni andaðist Axel Krogh í Havn. Axel var danskari. Hann varð føddur í Løsning í Jyllandi 21. desember 1925 og var sostatt 77 ár, nú hann doyði.

Axel starvaðist sum politistur alla sína tíð, fyri tað mesta sum ferðslupolitistur. Kom fyrstu ferð til Føroya við Parkeston í apríl mánað 1955. Tað var tá læknastríðið í Klaksvík leikaði uppá tað harðasta. Eftir áheitan frá Landsstýrinum sendi danska stjórnin skipið Parkeston við 152 vælvandum politistum til Føroya at herseta Klaksvíkina. Av tí at vágin var sperrað við teimum báðum gomlu skipunum Barmi og Svínoyar-Bjarna, við veirum og tunnum, sum søgdust at vera løddar, var talan um at seta politistarnar á land einar 6-7 km frá sjálvari Klaksvíkini. Tað hevur helst verið í Føgrulíð.

Samstundis kom fíggjarmálaráðharrin Viggo Kampmann til Føroya at samráðast og fekk eina avtalu í lag við Landsstýrið og klaksvíkingar.

Parkeston lá fyri tað mesta inni á Skálafjørðinum, men var eisini í Havn, Sørvági og á Tvøroyri. Til Klaksvíkar fór skipið ongantíð.

Axel var sostatt ikki við til at taka Klaksvíkina ta ferðina. Harafturímóti tók hann ein part av Havnini. Tí tað var á hesari ferðini, hann hitti Gunnleyg hjá Poulinu og Jóan Jakku Skómakaranum. Tað rann saman teirra millum, tey giftust 16. mai í 1957 og búsettust í Danmark.

Fyri 17 árum síðani fór Axel frá sum politistur við eftirløn. Gunnleyg og hann fluttu til Føroya og búsettust í Blákollugøtu á trøðni hjá Poulinu og Jóan Jakku. Vit gjørdust soleiðis nærmastu grannar.

Hann var ágrýtin maður og hegnigur, Axel. Saman við Gunnleyg fekk hann gjørt alt so vakurt, innan sum uttan dura. Tað hevur verið eitt njótilsi at sæð, hvussu vakurt lendið kring húsini hevur verið og er og hartil væl hildið.

Axel var eitt av hesum fólkunum, sum hava eina meining um alt, og hann duldi ikki, hvat hann meinti, m.a. um mong viðurskifti í føroyska samfelagnum. Hann var óførur at skriva lesarabrøv í Dimmalætting.

Eitt, sum eisini hevði hansara stóra áhuga, var flaggstongin. Hana røkti hann væl og flaggaði altíð, tá nakað var at flagga fyri. Á frælsisdegi Danmarkar 5. mai flaggaði hann við Dannebrog at minnast sínar starvsbrøður, sum doyðu undir krígnum, men annars brúkti hann føroyska flaggið. Seinastu ferð, hann flaggaði, var grundlógardagin 5. juni. Tá vant hann Merkið á stong - samstundis sum Dannebrog veittraði á Tinganesi.

Tankarnir leita til Gunnleyg, sum liggur á Ríkissjúkrahúsinum. Tað bar henni ikki til at vera til jarðarferðina í gjár.

Axel var ein vinsælur maður og góður granni. Hann verður saknaður.

**Finnbogi Ísakson**

## Dagurin

12. juni. Basilius. Helst til minnis um Basilius tann Stóra, sum var biskupur í Kesarea. Hann doyði í 379.